# Miðlarnir 5000 kr. í bót fyri øllýsing

**Sosialurin, Dimmalætting, Vikublaðið og Útvarpið hava øll fingið hvør sína bót á 5000 krónur fyri brot á rúsdrekkalógina, tá teir í fjør høvdu lýsing frá Hotel Føroyum um ølfagna, sum fekk 10.000 krónur í bót**

RÆTTARMÁL
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*




*Blaðstjórarnir báðir, Hjalgrím Samuelsen og Jan Müller, á veg úr Føroya Rætti í morgun, eftir at Dimmalætting, Sosialurin, Vikublaðið og Útvarpið vóru dømd at rinda 5000 krónur í bót fyri brot á rúsdrekkalógina*

*Mynd Jens Kristian Vang*

Klokkan var illa nokk farin av tíggju í morgun, tá dómur fall í málinum, har Sosialurin, Dimmalætting, Vikublaðið og Útvarpið eru skuldsett fyri brot á rúsdrekkalógina.

Rættarmálið byrjaði klokkan tíggju, og fáar minuttir seinni varð dómur avsagdur og alt var liðugt. Sosialurin, Dimmalætting, Vikublaðið og Útvarpið fingu øll hvør sína bót á 5000 krónur. Haraftrat verður hald lagd á lýsingarinntøkur hjá teimum ákærdu.

Hjá Dimmalætting verður hald lagt á 3.688,96 krónur, Vikublaðnum 4.687,50 krónur, Útvarpinum 3082,50 og hjá Sosialinum verður hald lagt á 1020 krónur.

Hotel Føroyar, sum skipaði fyri tiltakinum, fjølmiðlarnir lýstu við, fekk eina bót á 10.000 krónur.

Í nevndu lýsing stóð millum annað: "Føroya fyrst ølfagnaður verður á Hotel Føroyum fríggjakvøldið 16. september kl. 19.00... Við í prísinum er...Ølsmakking við 25 sløgum av øli... Ókeypis øl alla náttina... Bert dansur og ókeypis øl alla náttina fyri kr. 180,- fyri hvønn", samstundis var eisini ein mynd av einum ølglasi við onkrum í, og eisini vóru ølfløskur aftan fyri í myndini.

Á sjálvum rættarfundinum møtti stjórin fyri Dimmalætting, Hjalgrím Samuelsen og Jan Müller, stjóri á Sosialinum, meðan umboð fyri hinar boðar ákærdu fjølmiðlarnar ikki vóru til staðar.



*Jan Müller og Hjalgrím Samuelsen taka báðir við dóminum, sum er ein bót upp á 5000 krónur, samstundis sum teir undrast á, at tað ikki er loyvt at lýsa við øl í Føroyum*

*Mynd Jens Kr. Vang*

## Blaðstjórar taka við dóminum

**Tað vóru tveir samdir blaðstjórar Sosialurin fekk orðið á eftir at dómur var sagdur í rættinum í morgun. Báðir taka við dóminum, men kortini undrast teir yvir, at vit ikki kunnu lýsa við øli her, tá vit dagliga síggja slíkar lýsingar í útlendsku fjølmiðlunum**

RÆTTARMÁL
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Blaðstjórin á Dimmalætting og blaðstjórin á Sosialinum vóru rættiliga samdir, tá vit hittu teir eftir dystin, og taka teir báðir við dóminum.

– Við hesum dóminum er tað staðfest, at vit eisini hava eina medábyrgd. Tað er fínt og tað taka vit til eftirtektar, segði stjórin á Dimmu, Hjalgrím Samuelsen.

Jan Müller, blaðstjóri á Sosialinum, segði seg bara vera samdan við Hjalgrím Samuelsen, men hann undraðist kortini á, at tað ikki ber til at lýsa við øl ella víni í dagsins Føroyum.

– Eg haldi tað er undarligt, at føroysk bløð við einum veikum fíggjarligum grundarlagi, ikki kunnu lýsa við slíkum, tá lýsingar av øl og víni dagliga floyma yvir føroyingar í teimum útlendsku avísunum, vikubløðunum og útlendsku sjónvarpsrásunum, segði Jan Müller uttan fyri Føroya Rætt í morgun.

# Ongin ríðing í Havnadali

**Landsverk hevur sett forboðsskelti fyri ríðing upp á vegnum úti í Havnadali, og hetta harmast reiðmenn um, tí teinurin, sum nú er bannaður at ríða á, er ein tann mest brúkti hjá reiðfólki**

RÍÐING
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Seinastu dagarnar hevur eitt forboðsskelti staðið á vegnum út til Norðasta Horn. Eitt forboðsskelti, sum vanligi bilførarin kanska ikki leggur so nógv í, men eitt forboðsskelti, sum hevur fingið sinni í kók hjá nógvum reiðfólki í Havnini.

Skeltið ger tað nevniliga ólógligt hjá reiðfólki at ríða eitt strekki frá vegnum í Havnadali og niðan á Velbastaðsháls. Eitt strekki upp á 1,2 kilometur.

Fyri nógvum árum síðani var ein breyt framvið hesum vegnum, men hon hvarv tá vegurin varð breiðkaður. Og hesi breyt hevur stórur saknur verið í síðani. Men reiðfólk hava higartil lati sær lynda, men tá forboðsskeltið kom upp í farnu viku, gjørdist tað teimum ovboðið.

- Hatta strekki er partur av túrinum, vit brúka mest, og nú er vegurin so stongur fyri okkara viðkomandi, og vit sleppa ikki út í hagan, harmast Leif Berg, sum eigur og rekur Berg-Hestar.

Leif Berg veit ikki um nakra frágreiðing frá nøkrum, hví hetta skeltið nú er komið upp at standa. Og hann undrast eisini stórliga á, at skeltið nú er sett upp.

- Vit hava riðið har í nógv nógv ár, og tí halda vit tað vera rættiliga undarligt, at eitt skeltið nú verður sett upp, sigur Leif Berg, sum eftirlýsir teimum tað, Vinnumálaráðið lovaði teimum fyri fleiri árum síðani.

– Vit vóru á fundi við Vinnumálaráðið og Bjarni Djurholm fyri fleiri árum síðani, og har fingu vit lova, at gera eina rás, sum vit kunnu nýta. Tað hava vit ongantíð fingið, og nú er so eitt forboðsskeltið sett upp, og tað kann ikki vera rætt, sigur Leif Berg, sum vil hava forboðsskeltið niður beinavegin.

– Vit høvdu vónað, at fólk halda tað tey lovað. Tað er ikki hent enn, men hetta sum nú hendir kunnu vit ikki góðtaka, sigur Leif Berg at enda.

